# Stúra fyri pengunum

**SKÚLAFLUTNINGUR** Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum er ikki fegin um ætlanina at flyta ein part av Vinnuháskúlanum til Klaksvíkar

Áki Bertholdsen

– Vit eru betonkiligir um ætlanina at spjaða sjóvinnuútbúgvingarnar sundur.

Eyðstein Djurhuus, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum er ikki serliga fegin um ætlanin at flyta ein part av Vinnuháskúlanum til Klaksvíkar.

Ella, fyri at tað skal vera heilt rætt, er hann ikki ímóti at útbúgvingin verður í Klaksvík, men hann er ímóti at hon verður liðað sundir.

– Vit taka ikki støðu til, hvar í landinum, skúlarnir skulu vera. Tað einasta vit hava áhuga í, er, at fakliga støðið er nóg høgt.

– Tí skulu allar sjóvinnuútbúvingar vera á einum og sama staði, tí annars kemur tað fakliga støðið í vanda, leggur hann afturat.

**Vit eru betonkiligir**

### Knípur við pengum

Orsøkin til, at hann stúrir fyri gongdini, verður útbúgvingin liðað sundur, er, at hann er ikki serliga bjartskygdur um, at politiski myndugleikin fer at játta nóg mikið av pengum til at varðveita báðar skúlarnar á einum nóg høgum støði.

Og hann staðfestir, at longu sum er knípur tað við at halda tað fakliga støðið á tí skúlanum, vit hava í Havn.

Hann sigur, at orsøkin til tað er, at hetta eru skúlar, sum krevja rættiliga nógva og dýra útgerð.

– Men tað knípur at fáa játtan til hesa útgerð, sum krevst fyri at varðveita fakliga støðið á skúlanum í Havn.

– Tá ið tað longu nú gongst illa at halda ein skúla dagførdan við útgerð, vænta vit ikki, at hetta verður lættari við tveimum sjóvinnudeplum í landinum, sigur hann.

Verða útbúgvingarnar spjaddar sundur, fer tað at seta nógv størri krøv til politiska myndugleikan og hann er ikki vísur í, at politiski myndugleikin verður førur fyri at lúka hesi krøvini.

Hann vísur eisini á, at arbeiðsbólkurin, sum Mentamálaráðið setti at viðgera spurningin, mælti frá at spjaða útbúgvingarnar sundur.

Men politiski myndugleikin hevur so gjørt tað kortini og hann hevur illgrunan av, at hetta er meiri ein politisk semja, heldur enn tað er ein avgerð, sum byggir á eina fakliga meting.

*aki@sosialurin.fo*

**Fakliga støðið kemur í vanda**

# Eg fái ikki ilt av at flyta til Klaksvíkar

**SKÚLAFLUTNINGUR** Formaðurin í Maskinmeistarafelagum sær onki forgjørt í at flyta ein part av Vinnuháskúlanum til Klaksvíkar, men politikarar mugu verða greiðir yvir sína ábyrgd

Áki Bertholdsen

– Eg fái ikki ilt av, at partar av sjóvinnuútbúgvingunum verður fluttur úr Havn til Klaksvíkar.

Páll Hansen formaður í Maskinmeistarafelagnum hevur onga avgjørda meining um ætlanina at flyta skipara- og maskinistskúlan úr Havn til Klaksvíkar, samstundis sum at skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingin verður verandi í Havn, men verður uppstigað til bachelor.

Men hann leggur dent á, at spurningurin er ikki viðgjørdur í Maskinmeistarafelagnum og tí tosar hann bara fyri egnu rokning.

– Eg dugi ikki at síggja tað stóra problemið, sum hann málber seg.

### Fyrimunur

Hann sigur, at tað kann enntá hava sínar fyrimunir við at flyta hendan partin av skúlanum til Klaksvíkar.

Hann sigur, at Maskinmeistarafelagið leggur stóran dent á, at minst ein flokkur av næmingum verður tikin inn á maskinist skúlan um árið fyri at varðveita ein javnan streym av maskinistum.

– Men hesi síðstu árini hevur Vinnuháskúlin í Havn havt lyndi til at leypa maskinistskúlan um við teirri avleiðing, at næmingar ikki eru tiknir inn á maskinistskúlan.

– Heldur ikki í januar í ár vórðu næmingar tiknir inn á maskinistskúlan, leggur hann afturat.

Hann sigur, at hetta er eitt rák, sum hóvar teimum í Maskinmeistarafelagnum serstakliga illa, tí tað kann bróta fakið niður.

– Hetta er ógvuliga keðiligt, tí kemur stígur í maskinistskúlan, kann tað fáa áhugan fyri fakinum at fjarða burtur og sostatt er vandi fyri, at fakið verður niðurbrotið.

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum heldur sostatt, at verður maskinistskúlin fluttur til Klaksvíkar, kann tað verða ein ávís trygd fyri, at minst ein flokkur av næmingum verður tikin inn um árið og tað sær hann ein stóran fyrimun í.

### Ábyrgd

Men Páll Hansen leggur afturat, at verður skúlin fluttur til Klaksvíkar, krevur tað eisini, at politikararnir eru serstakliga tilvitaðir um ábyrgdina teir hava fyri skúlanum.

– Hetta er ein skúli, sum krevur nógva útgerð, men tað knípur longu sum er at játta nóg mikið av pengum til útgerð og amboð til Vinnuháskúlanum, vit hava í Havn,

– Tí mugu politikarar gera sær greitt, at verður ein partur av skúlanum fluttur, mugu teir eisini vera til reiðar at játta pengar til neyðuga útgerð og amboð, sigur Páll Hansen.

Hinvegin hevur tað eisini verðið ført fram, at tað verður eitt bakkast fyri fakliga umhvørvið at flyta skúlan til Klaksvíkar heldur enn at varðveita ein sterkan, fakligan depil í Havn.

Men tað heldur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum ikki verður nakar trupulleiki, tí útbúgvingarnar eru ikki ókendar í Klaksvík og verður skúlin mentur í Klaksvík, mennist tað fakliga umhvørvið eisini.

*aki@sosialurin.fo*

**Í Klaksvík verður kanska størri trygd**



*Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum sær ikki tað stóra problemið, men formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum er øgiliga betonkiligir um ætlanina at skipa ein sjóvinnudepil í Klaksvík afturat tí, vit hava í Havn. Men báðir eru samdir um, at hetta fer at seta stór krøv til politikararnar*

**Hetta er ógvuliga keðiligt**